## DAGSINS MEINING

# Eitt heppið val

Tað er breið semja um, at Leiklistaráðið, ið er setanarmyndugleiki hjá Tjóðpallinum, hevur verið sera heppið við valinum av stjóra fyri nýggja stovnin. Jenny C. Petersen hevur virkað innan umsiting av sjónleiki í mong ár, hon kennir sum fáur umhvørvið, hon er ein royndur fyrisitari og hon hevur gott innlit í leiklistina. Sum næsti medarbeiðari hjá stóra manninum innan føroyska leiklist, Eyðuni Johannessen, hevur hon ognað sær holla vitan um føroyska eins væl og altjóða leiklist. Vit vilja her fegin taka undir við teimum mongu, sum í hesum døgum siga: "Er tað nakar, sum klárar hasa torføru fyri ikki at siga ómøguligu uppgávu, so er tað Jenny C. Petersen". Vit ynskja Jenny, leikarum og tjóðpallinum tillukku og ynskja alt gott fyri hetta týdningarmikla mentanarøki.

Leiklistin í Føroyum hevur veruliga brúk fyri øllum góðum ynskjum, tí tað verður ein tung og torfør uppgáva at byggja upp ein tjóðpall, eitt nationalteatur, við eini játtan, sum ikki røkkur til meira enn ein-tveir leikir árliga. Hetta krevur, at leiðslan skal nýta nógva orku til at útvega fígging til virksemið, sum ikki kann røkkast innan karmarnar av løgtingsfíggjarlógini. Her er ein stórur vandi fyri, at leiðslan fer at nýta alla sína orku til at finna sponsorar og til at fáa raksturin at hanga saman. Ikki tí tað eru ivaleyst góðir møguleikar til at finna stuðul innan eins og uttanlanda, eitt nú úr norðurlendskum grunnum, men hesin parturin kann ikki verða høvuðsálitið. Tjóðpallur eigur at metast og virðast sum einhvør annar mentanarstovnur t.d. Landsbókasaavnið, og eigur sostatt sín sjálvsagda part av løgtingsfíggjarlógini.

Nú fer so Tjóðpallurin av álvara at virka. Vit ivast ikki í, at hetta verður leiklistini og føroyskari mentan til stórt gagn. Leiklistin er ein hin elsta listagreinin hjá mannaættini. Hon hevur alstóran týdning fyri menningina hjá eini tjóð. Tað er av stórum týdingin, at hitt almenna tryggjar leiklistini góð virkiskor. Tjóðpallurin skal vera fyri allar føroyingar. Hetta merkir, at hann eisini má út um landið við sínum framførslum. Hetta kann gerast heilt ítøkiligt við at farið verður á turné ella leikferð við nøkrum av teimum leikum, ið verða framførdir. Ein annar og alt ov líti brúktur møguleiki er at nýta útvarp og sjónvarp. Nú hesir stovnar eru lagdir saman skuldu møguleikarnir fyri betri samskipa verið munandi øktir. Almenningurin hevur tí orsøk at vænta meira drama í ÚF og SvF í framtíðini í einum tøttum samstarvi við Tjóðpallin. Við hesum ynskja vit Tjóðpalli, leikarum og stjóra alt tað besta!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Er tað bert borgarstjórin á Tvøroyri, sum hóttir tær smærri kommunurnar í Suðuroy?

**Finnleif Guttesen**
*Tvøroyri*



Vónandi er tað ikki so galið, at alt býráði tekur undir við framferðarháttinum hjá borgarstjóranum.

Hvat í allari víðu ver viðkemur tað borgarstjóranum á Tvøroyri, hvat tær smærru kommunurnar viðgera og viðtaka. Skulu tær smærri kommunurnar, sum hava samstarv við Tvøroyri og Vág ***straffast***, tí tær tora at viðgera mál, sum tær halda verða frægast.

**Ein greið hóttan**
Í Sosialinum 22. januar 2005, hóttir borgarstjórin óbeinleiðis Hvalbiar-og Fámjins kommunu, tí tær viðgera spurninginum at flyta heilsuskúlan av Tvøroyri.

Sjálvsagt hava ***allar*** kommunur rætt til at viðgera hvat tær halda verða frægast fyri Suðuroy. Og borgarstjórin á Tvøroyri skaðar alt Suðuroy, við at fara alment út og óbeinleiðis hótta tær smærri kommunurnar..

Tað verður ikki hóttanir móti øðrum kommunum og persónum, sum far Suðuroynna á føtur aftur.

# Hvør spekulerar í atkvøðum?

**Jenis av Rana**

.....viðmerking til Jógvan í Løðuni, í sambandi við lesarabræv í Dimmalætting leygardagin.

Týsmorgun, fyri skjótt 14 døgum síðani, ringdi útvarpsjournalistur og spurdi meg um hetta at kunna draga frá í skatti gávur, ið verða latnar til góðgerðandi endamál. Eftir vanligum føroyskum fólkasiði svaraði eg beinleiðis spurningum hansara, prátið okkara millum metti eg vera positivt og sera skilagott, og nógvar viðmerkingar síðani hava eisini bent á tað.

Til leygardagin, tá kemur Jógvan í Løðuni brádliga við einari minni vakrari viðmerking í Dimmalætting, har hann skuldsetur Miðflokkin fyri at fremja atkvøðuspekulatión.

Eg varð uppringdur, spurdur og svaraði. At maður ókravdur fer í bløðini við órættvísum álopi, sigur nokk meira um hvør spekulerar.



# Farstøð, har tú arbeiðir fyri at koma víðari

**Annita á Fríðriksmørk**
*valevni Tjóðveldisfloksins*




Fólkating er ikki ein farstøð, har tú situr og bíðar eftir og hyggur eftir fólki, til onkur annar kemur og avgerð, nær tú skalt víðari.

Fólkating er ein farstøð, har tú arbeiðir fyri at koma víðari, har tú brúkar teir møguleikar og tey amboð, sum eru til taks til tess at sleppa víðari.

Soleiðis síggi eg munin á teimum fólkatingsumboðum, sum hava viljað nakað á fullveldisleið, og so á teimum, sum onki hava viljað.

Vilt tú ikki víðari á fullveldisleið, hvat skalt tú so gera á Fólkatingi. Fortelja dønum um Føroyar? Jamen, hvør annar á Fólkatingið enn Norðuratlantsbólkurin og Erlendur Patursson í síni tíð, hevur skipað so fyri, at danir verða kunnaðir um Føroyar og um føroysk viðurskifti.

Um tú spyrt teg sjálva, hvør føroysk umboðan í Fólkatinginum fer at stríðast fyri t.d. hesum:

- at Føroyar ikki verða dirgnir inn í ES við t.d. nýggju ES grundlógini ella
- at vit fáa føroyskan limaskap í Norðurlandaráðnum ella
- upplýsa um týdningin, at eisini danir viðurkenna okkum sum tjóð, so vit kunnu samstarva á jøvnum føti við eisini danir.

Tað verður neyvan nøkur, sum fer at stríðast fyri hasum, sum ikki eisini ynskir, at vit eru eitt land javnbjóðis øðrum londum.

Kemur Tjóðveldisflokkurin innaftur við umboðan á Fólkating, so veit føroyingurin:

- at Føroyar fáa eitt sjónligt umboð og
- eitt umboð, sum hoyrist og
- eitt umboð, sum vil arbeiða fyri at koma víðari

Tey úrslit umboð floksins hava lagt eftir sær, og tær ítøkiligu ætlanir, sum flokkurin hevur við fólkatingssessinum, siga so mikið, at á Danatingið sita vit ikki og bíða eftir, til onnur eru klár.

Á Danatingi veist tú, at tú skalt arbeiða, og hvussu tú skalt arbeiða fyri at koma víðari!


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.